# Ein glotti í fortíðina

**Útflutningsvinnan, sum reiðiliga fekk banahøggið, tá einaræðisharrin Franco tók ræðið í Spania í 1938, var klippfiskaframleiðslan. Tað fekk stórar avleiðingar**

**AFTURLIT**
*J. Lindensov*



*Vit endurgeva nøvnini, sum tey eru søgd okkum: 1. Marianna Mortensen (den glade enke), Argir, 2. Elsba Joensen (á Borg), Argir, 3. Petra Andersen (hjá Stubba-Jens), Tórshavn, 4. Anthon Kragesteen, Tórshavn, 5. Louisa Wægter (Vektara Louisa), Tórshavn, 6. Maria Joensen (Mia á Borg), Argir, 7. Borghild Midjord (dóttir Petru hjá Stubba-Jens), 8. Arandis Olsen, Tórshavn, 9. Laurits Kragesteen, Tórshavn, 10.Hjalmar Kragesteen, Tórshavn, 11. Signhild Hansen (hjá Poul Eli), Tórshavn, 12. Sverri Mortensen, Argir, 13. Elin Maria Brecher, ættað úr Leynum, Skúvoy, 14. Svanbjørg Petersen (hjá Knút skómakara), Tórshavn, 15. Martin Joensen (á Borg), Argir, 16. Ida á Dunga, Tórshavn, 17. Johannes Hjul Olsen, Argjabogi, 18. Maja Dalsgarð, Argir, 19. Bette á Dunga, Tórshavn, 20. Hans Joensen (Hans á Argjaboga), Argjabogi*

*Myndaeigari: Sverre Mortensen*



Tórshavn er staðurin, har fólk hugna sær, og vón innflytaranna at fáa støðugt arbeiði. Soleiðis endar Andreas J. Ziska bók sína »Tórshavn lív og vøkstur« við brotinum »Afturlit«.

Vit at kaga eitt lítið í bókina, sum er prentað í 1959 á prentsmiðjuni hjá Marius Ziska. Hendan prentsmiðja var partur av snikkaravirkinum hjá Johan Ziska, lágur bygningur framvið Havnará, sum nú er parkeringspláss aftanfyri Ebenezer.

Bókin er dýrgripur, sum fortelur hópin áhugavert um Havnina.

Á síðu 140 skrivar Ziska m.a.! Árini aftaná fyrra kríggj (1914-18) tóku teir stýrandi sær fyri at kanna møguleikar viðvíkjandi livilíkindum og inntøkuroyndum á sjógvi og landi. 13. apríl 1938 setti statsministeriið stóra nevnd til gjølla at granska og geva frágreiðing, og um møguligt at seta fram uppskot til nýggj tiltøk.

Í nevndina komu at sita 21 mans. Kanningar teirra eru forvitnisligar og greiðar.

Teir byrja við fólkatalinum, sum ár 1935 er 25.744, harav 13.085 menn og 12.659 kvinnur; men siga teir, síðani er nógv fólk flutt úr Føroyum, undanfarnu 5 árini: 779 persónar. Viðvíkjandi ognar- og inntøkustøðu siga teir: at eftir teirra gransking var skattapliktiga inntøkan pr. fólk ikki størri enn 300 kr. fyri árið 1936, meðan hon í Danmark sama ár var gjøgnumsnitliga 800 kr. Nevndin sigur at føroyingar hava møguleikar at fáa ódýran kjøtmat (hvalatvøst) og eplir. »Men selv om Forskellen herved formindskes noget, er der ingen tvivl om, at den ubemidlede Befolkning på Færøerne lever under ringere Kaar end den ubemidlede Befolkning idet øvrige Land«. Hetta hevur Føroya Fiskimannafelag sagt eisini.

Inntøkan hjá fiskimonnum 1936 var í miðal 508 kr. og í 1937, 634 kr. Afturat hesum pengum kom ókeypis vistarhald umborð á skipunum.

Tá kanningarnevndin arbeiddi í Føroyum, vóru 10 trolarar í vinnu til Føroyafólk. Av hesum tali vóru 6 skrásettir í Tórshavn, nevnliga: »Skálaberg« (283 tons), »Stella Argus« (310 tons), »Norðstjørnan« (293 tons), »Tór I« (285 tons), »Tór« (338 tons), »Norðbúgvin« (344 tons). Erfaringin hevur víst, siga teir, at fiskarar umborð á trolarum hava fingið dupult so stórar inntøkur sum við snørisfiskiskap, at trolarar geva heimafólki nógv arbeiði, tá saltfiskurin verður turkaður til klippfisk.

Teir nevna avreiðingarlond og avreiðing í 1938, at fáa søluvirði um 10-11 mill. kr. til hesi lond: Spaniu, Italiu, Portugal og Grikkaland, og vísa teir á onnur keypslond:

Egypten, Afrika og Millum- og Suðuramerika; at Ísland í 1938 hevði selt og sent 5000 tons av klippfiski til Suðuramerika.

Um sølur av kalva hevur seinasta ár verið gott, og fyri útflutningi av feskum fiski vóru sølulíkindini til Danmark góð, segði nevndin. Nevndin setti fram til skjóta viðgerð nógv góð uppskot, men nú kom aftur kríggj, øgiligari enn hitt fyrra veraldarkríggið.

5 ár vardi hetta øgiliga kríggj, og øll hesi ár var sambandið kvett millum Føroyar og Danmark.

Nógv áhugavert er at lesa hjá Andreas Ziska, men vit steðga við árinum 1938, tá borgarastríðið í Spania gjørdi enda á útflutningi okkara av klippfiski til Spania.

Myndin av fiskafólkinum er frá 1938 úti á Rundingi. Vit síggja Hjalmar á Krákusteini (í keppi) og Anthon Kragesteen (hattleysur), altíð við brosi á kinn. Niels var fyristøðumaður fyri fiskaturkingini í Evensens pakkhúsi, sum tað tá kallaðist, fyrr Konslarapakkhúsið, ið stóð har Fiskacentralurin seinni var og nú Skipasmiðjuverkstaðurin.

Søga kundi verið skrivað um øll hesi fólkini. Hesaferð siga vit bert hvørji fólkini eru. Okkurt eigur at verða lagt afturat. Ískoytisheitini - sjálvsagt fyri at siga hvørji fólkini eru. Enn eru mong, sum minnast flestu teirra.



*Á Rundingi var stórt fiskastykki. Har vóru eisini nýttar sonevndar lektir (hegnrammur). Myndin sýnir sjálvan Runding við húsini, sum vórðu bygd til fyristøðufólkini á el-verkinum. Klippfiskur til turkingar liggur á sonevndu lektunum*



*Hendan myndin er tikin framman fyri Evensens-pakkhús, f.v.: Johs. Hjul Olsen, Mia á Borg, Martin á Borg, Svanbjørg Petersen, Sverre Mortensen, og Hans á Argjaboga*

*Myndaeigari: Sverre Mortensen*